# Havnar Svimjifelag hevur koyrt venjaran

**Sum ein avleiðing av, at Havnar Svimjifelag rýmdi mitt í einari kapping í Klaksvík, hevur felagið koyrt venjaran, umframt at Svimjisamband Føroya hevur útihýst venjaran frá øllum kappingum fram til í vár og hevur strikað øll úrslit hjá felagnum á Ægirsstevnuni**

SVIMJING
*Hilmar Jan Hansen*



*Tað var í svimjikappingini, sum Ægir skipaði fyri, at venjarin hjá Havnar Svimjifelag gjørdi av at taka allar svimjararnar úr kappingini. Hetta hevur nú fingið avleiðingar, so venjarin er koyrdur, umframt at hann hevur karantenu frá øllum kappingum til komandi vár*

Tað vakti miklan ans, tá Havnar Svimjifelag leygarmorgunin 19. oktober tók allar sínar svimjarar úr svimjikappingini Ægirstevnan, sum var í Klaksvík.

Orsøkin var misnøgd við nakrar kolldømingar móti svimjarum hjá felagnum kvøldið fyri, og tískil mátti kappingin gjøgnumførast uttan svimjararnar úr størsta felagnum í landinum.

Frammanundan hesum hevði Havnar Svimjifelag givið til kennar, at varð høvuðsdómarin Sørin Djurhuus ikki koyrdur frá, rýmdi felagið úr kappingini.

Men at koyra høvuðsdómaran frá, kundi ikki koma upp á tal, søgdu fyrireikararnir, og tí takkaði Havnar Svimjifelag fyri seg henda leygarmorgunin og fór avstað við øllum sínum svimjarum.

Hetta er fyrstu ferð, at nakar veit um at eitt felag er rýmt úr einari kapping, men hóast einki fordømi, hevur hendingin nú fingið fylgjur.

Havnar Svimjifelag hevur koyrt venjaran, Rók í Jákupsstovu, úr starvi sum høvuðsvenjari, og Svimjisamband Føroya hevur strikað øll úrslitini hjá felagnum á Ægirsstevnuni, umframt at nú fyrrverandi høvuðsvenjarin hjá Havnar Svimjifelag er útihýstur frá øllum kappingum, fram til smáunglingameistarakappingina, SUM, sum verður í vár.

### Koyrdur áðrenn

Sum skilst, var hendingin ikki nakað, nevndin í Havnar Svimjifelag átti part í, og tí tók felagið eisini avleiðingarnar av tí, ið var hent, og segði høvuðsvenjaran hjá sær úr starvi fríggjadagin 25. oktober, dagin fyri at aðalfundur skuldi vera í Svimjisambandi Føroya.

– Tað, sum hendi í Klaksvík, var ein orsøk, men tað vóru eisini aðrar orsøkir til, at vit loystu venjaran úr starvi. Yvirhøvur havi eg lítlan hug at tosa um tað, sigur formaðurin í Havnar Svimjifelag, Hans Andrias Djurhuus.

– Vit í felagnum eru ógvuliga kedd av tí, sum hendi í Klaksvík, og nevndin er samd um, at slíkt hoyrir ongastaðni heima. Hetta er avgjørt ikki nakað, vit eru errin av, tí tað kann ongantíð vera rætt at boykotta eina kapping soleiðis.

Formaðurin í Havnar Svimjifelag sigur, at tey í nevndini hildu henda framferðarháttin vera so ógvusligan, at tað ikki kundi fara aftur við borðinum uttan at fáa fylgjur.

– Eisini hoyrdu vit undan aðalfundinum, at vit kundu vænta okkum ógvusliga revsing fyri at vera rýmd úr einari kapping. Vit vita jú frá øðrum ítróttargreinum, at lið verða tveitt úr allari kappingini, tá tey bera seg soleiðis at, sigur Hans Andrias Djurhuus.

– Tá avtornaði, bleiv tann nú fyrrverandi høvuðsvenjarin hjá okkum útihýstur úr øllum kappingum fram til SUM, og haraftrat blivu øll úrslitini hjá okkara svimjarum á Ægirstevnuni strikað. Tað var betur sloppið, enn vit høvdu óttast fyri.

### Einki fordømi

Sum nevnt, er einki fordømi at finna í føroyskari svimjing, tá tað snýr seg um at eitt heilt felag rýmir við øllum sínum svimjarum mitt í einari kapping. Tað kanska gjørdi sítt til, at revsingin til Havnar Svimjifelag ikki gjørdist so hørð.

– Tá vit hugdu at reglunum, funnu vit einki fordømi, og heldur ikki funnið vit nakað skrivligt um, hvussu farast skal fram í slíkum førum, sigur Katrin Joensen, forkvinna í Svimjisambandi Føroya.

– Sjálvandi hevur tað ávirkað okkara avgerð um revsing, men eisini hildu vit, at Havnar Svimjifelag á aðalfundinum vísti rætta hugburðin, tá nevndin reistist og bað um umbering fyri tað, sum var hent.

Katrin Joensen sigur, at nú aftaná duga øll at síggja, at tað, sum hendi í Klaksvík, var skeivt.

– Eg trúgvi ikki, at slíkt sum hetta fer at henda aftur, men kortini arbeiða vit við at savna allar reglurnar hjá okkum saman, so vit í øllum førum hava svart upp á hvítt í lógartekstinum, hvussu farast skal fram.

Hon nevnir í hesum sambandi, at Svimjisamband Føroya er í holt við at savna allar reglur og lógir, nú arbeitt verður við at gera føroyskt tilfar til bæði dómarar og hjálparfólk at arbeiða eftir.

### Eingin venjari settur

Hóast tey eru sera hørm og skammast yvir tað, sum er farið fram, halda tey fram við sínum arbeiði í Havnar Svimjifelag, har serliga nevndin nú noyðist at leggja nógv fyri.

– Vit hava ikki sett nakran nýggjan venjara enn, so fyribils royna vit at klára okkum við teimum kreftum, vit frammanundan hava í felagnum. Men hetta merkir sjálvandi fyri okkum í nevndini, at vit hava munandi meira at gera, enn annars, sigur formaðurin, Hans Andrias Djurhuus.

– Nú noyðast vit eisini at taka okkum av tí umsitingarliga og annars røkja aðrar uppgávur, sum vanliga liggja hjá høvuðsvenjaranum. Tað er sjálvandi eitt mark fyri, hvussu nógva tíð foreldur og onnur í nevndini hava til at gera hetta arbeiðið sjálvboðið, men soleiðis mugu vit royna at klára okkum nú.

Nógvar kappingar eru fyri framman, og sum vant ætlar Havnar Svimjifelag at vera uppií, tá tær eru. Og felagið fer heilt vist at fullføra hvørja einastu av øllum hesum kappingunum, sum eru!

# »Eg helt meg gera tað rætta«

**Fyrrverandi venjarin hjá Havnar Svimjifelag, Rókur í Jákupsstovu, heldur seg hvørki vera rætt viðfarnan av felagnum ella Svimjisambandi Føroya**

SVIMJING
*Hilmar Jan Hansen*

Hóast formaðurin í Svimjisambandi Føroya heldur, at øll nú aftaná duga at síggja, at tilburðurin í Klaksvík var skeivur, og at formaðurin í Havnar Svimjifelag sigur, at nevndin er samd um, at slíkt ongastaðni hoyrir heima, er høvuðspersónurin í málinum, Rókur í Jákupsstovu als ikki samdur.

– Eg helt meg gera tað rætta í Klaksvík, tá eg stóð har við einari rúgvu av svimjarum, ið ikki vildu svimja, umframt at eg hevði uppbakking frá hjálparvenjaranum hjá mær, sigur hann.

– Ein nevndarlimur í Havnar Svimjifelag var við, men gjørdi ið hvussu er einki fyri at forða fyri tí, sum hendi, tá vit gjørdu av at taka allar svimjararnar úr kappingini.

Sostatt er fyrrverandi venjarin hjá Havnar Svimjifelag alt annað enn nøgdur við málið, soleiðis sum tað liggur í løtuni, og hann ætlar eisini at gera nakað við tað.

### Ikki fyrstu ferð

Rókur í Jákupsstovu heldur, at tey tóku svimjararnar úr kappingini so regluliga, sum tað ber til. Hetta hendi á einum tekniskum fundi leygarmorgunin 19. oktober, sum er ein fundur, har tað eitt nú ber til at taka svimjarar úr einari kapping.

Tað, sum helst vakti ríkiligan ans, var at Havnar Svimjifelag á tekniska fundinum henda morgunin tók allar sínar svimjarar úr kappingini.

– Hetta er ikki fyrstu ferð, at hetta er hent, men ta fyrru ferðina, eg kenni til, hendi tað áðrenn eina kapping. Tá vóru heilt aðrar orsøkir til, at vit tóku allar okkara svimjarar úr einari kapping, sum skuldi vera í Fuglafirði, sigur Rókur í Jákupsstovu.

Hann heldur nógv av tí, sum er komið fram um Ægirsstevnuna vera skeivt, og eitt nú vísir hann aftur, at tey í Havnar Svimjifelag kravdu at fáa høvuðsdómaran í kappingini settan frá, um tey skuldu halda fram.

– Tað stutta av tí langa var, at svimjararnir kendu seg at hava verið so fyri órætti, at teir snøgt sagt ikki vildu halda fram í kappingini. Og tá er eisini vónleyst at halda fram, so vit royndu altso at gera tað so regluliga sum gjørligt, sigur hann.

– Eg helt, at eg í støðuni gjørdi alt fyri at verja okkara egnu svimjarar, og eg helt meg eisini hava ta neyðugu uppbakkingina til tað. Tí skilji eg ikki ordiliga, at tað aftaná skal ganga út yvir meg við einari burturvísing og út yvir svimjararnar, sum fingu øll síni úrslit í kappingini strikað.

### Sakførari uppí

Hin parturin av søguni er so, at Rókur í Jákupsstovu fríggjadagin 25. oktober bleiv koyrdur úr starvinum sum høvuðsvenjari í Havnar Svimjifelag.

– Tað avgerðina skilji eg ikki, tí eg havi ikki fingið so frægt sum eina ávaring frammanundan. Og tað finst framvegis onkur í nevndini, sum yvir fyri mær hevur givið til kennar sína fullu uppbakking, sigur hann.

– Nú er tað blivið til, at eg havi alla ábyrgdina av tí, sum er farið fram. Tí kann eg eisini liva við, tí eg havi jú sum høvuðsvenjari evstu ábyrgd av tí, ið hendir í einari kapping. Men nevndarlimurin, sum var við okkum í Klaksvík, hevur eftir øllum at døma neyvan kunna nevndina um, hvat veruliga hendi har norðuri.

Uppsøgnin var ógvuliga knøpp, og Rókur í Jákupsstovu fekk ikki ta uppsagnartíðina, hann annars helt seg hava rætt til.

– Eg var settur í starvið eftir somu treytum, sum limir í Starvsmannafelagnum, og tí átti eg at fingið tríggjar mánaðir í uppsagnartíð. Men tað fekk eg ikki, sigur hann.

– Sakførari hevur hugt at málinum, og sum skilst havi eg góðar møguleikar at krevja endurgjald fyri mistu uppsagnartíðina, og tað rokni eg eisini við, at eg fari at gera.

Starvið hjá Róki í Jákupsstovu var fulltíðarstarv, og tí stendur hann í dag uttan nakað arbeiði. Hvussu verður við framtíðini, hevur hann ikki tikið støðu til enn.

SMS blaðið






*Fyrsta SMS-blaðið, sum kom út í oktober 1977*

# SMS í 25 ár

**SMS blaðið hesaferð eitt sindur øðrvísi. Og tað er eisini meining. Tað skal líkjast fyrstu SMS bløðunum sum komu út longu í 1977. Forsíðan er eins – tó at myndin er nýggj – bygnaðurin av blaðnum er tann sami, og fleiri av lýsingunum eru gjørdar soleiðis, at tær líkjast lýsingum frá sjeytiárunum. Hetta er fyrst og fremst gjørt til tess at tað skal verða eitt sindur forkunnugt, eins og at vit vilja vísa á munin á tí, vit gera í dag, og tí vit gjørdu fyri 25 árum síðani.**

**Vit vóna, at øll taka væl undir við hesum øðrvísi blaðið, og fáa okkurt burtur tí tilfarinum, sum stendur í blaðnum.**

ALLIR VEGIR FØRA TIL SMS